# THREES ANNA LEITAR EFTIR FØROYUM

– TAÐ ÁHUGAVERDA FYRI MEG SUM **RITHØVUND** ER, AT TIT FATA TAÐ SUM NORMALT AT LIVA Í EINUM LANDI, SUM FLEST ONNUR HALDA VERA HEILT EKSTREMT Í ALLAR MÁTAR, SIGUR HÁLENDSKA **THREES ANNA**, SUM ER KOMIN AT SAVNA TILFAR TIL EINA SKALDSØGU UM **FØROYAR**



**VITJAN**
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Hon býtur fast um blýantin, í tí hon knýtir langa brúna hárið í ein skjótan hesthala. Á øðrum knænum liggur ein slitin skriviblokkur við tættskrivaðum notum, telefonmumrum, krutlitekningum og smáum, gulum seðlum peiggjandi út millum síðurnar. Sjálvt um tað er hon, sum fortelur beint nú, eydnast tað hálendska rithøvundanum og leikstjóranum Threes Anna at spyrja og krutla nógv meir enn journalisturin hesa løtuna.

– »Hví roykja so nógv føroysk mannfólk ball?« vil hon knappliga vita, eins og hon undrar seg yvir, at málningar eftir føroysk listafólk eru at síggja í flestu føroyskum heimum.

Í 10 dagar nú hevur Threes Anna verið á kanningarferð í Føroyum í sambandi við eina skaldsøgu, hon er í ferð við at skriva og alt kann brúkast sum íblástur.

Livandi brúnu eyguni festa seg í sjálvt minsta smálut, og tey hava verið víða um seinastu dagarnar. Í vikuskiftinum var hon við Mykinesmonnum í fjøllunum eftir nøkrum veðrum. Í gjár gekk leiðin runt til bøndir saman við MBM eftir mjólk. Beint nú roynir hon at koma í samband við onkran, sum kann vísa henni runt á einum fiskavirki, og annars bíðar hon eftir einum veruligum føroyskum stormi, so hon kann royna tað eisini.

## Skaldsøgu um Føroyar

Hálendski rithøvundin og leikstjórin Threes Anna hevur sett sær fyri at finna út av, hvat Føroyar veruliga eru, hvussu tað ber til, at fólk yvirhøvur hava livað og yvirlivað her heilt inn í eina modernaða tíð, har náttúran framvegis so ofta eigur seinasta orðið. Eygleiðingarnar og upplivingarnar skal hon brúka til eina skaldsøgu, har Føroyar eru leikpallurin og føroyingar eru íblástur til persónarnar.

– Mínar bøkur ganga altíð fyri seg í ekstremum umstøðum av ymsum slag. Hesuferð skuldi tað vera í gerandisdegnum hjá fólki, sum liva í einum veruliga avbyrgdum oyggjasamfelag. So tá eg rendi meg í Føroyar á heimskortinum, var eg ikki í iva um, at hetta var rætta staðið, sigur Threes Anna.

»Bird Island« ella »Fuglaoyggin« er fyribils arbeiðsheitið á skaldsøguni, har ein 10 ára gamal føroyskur smádrongur væntandi verður høvuðspersónur. Nakra romantiska søgu av gamla slagnum um Føroyar sum serstøk tjóð skulu vit tó neyvan vænta.

– Tað áhugaverda fyri meg er, at tit als ikki síggja tykkara umstøður sum ónormalar. Tí fata persónarnir í søguni heldur ikki sín gerandisdag sum nakað serligt ella øðrvísi og geva sær ikki stórvegis far um umstøðurnar. Tey eru bara noydd at innrætta seg eftir teimum og fáa gerandisdagin at rigga allíkavæl, fortelur Threes Anna í tí hon er klár við enn fleiri spurningum.

– Hvat gera tit, um eitt stórverkfall steðgar øllum innflutningi av mati í fleiri vikur? Hví fara tit ikki upp at flákra, tá stormar og illveður leggja alla samferðslu lamna, so tit ikki sleppa til arbeiðis og tiltøk mugu avlýsast? Hvussu ber tað yvirhøvur til at tit búgva her, tá tit høvdu havt tað so nógv lættari alla møguliga aðrastaðni?



Hálendski rithøvundurin Threes Anna er longu byrjað at skriva notir til sína nýggju skaldsøgu um lívið í Føroyum

## Til útróðrar og til handils

Threes Anna er greið yvir, at hon uttan iva kundi funnið svarini til nógvar av sínum spurningum við at siti heima í Hollandi við eini bók ella teldu. Men tað er ikki mátin, hon arbeiðir sum rithøvundur og filmsleikstjóri

– Eg vil vita, hvussu tað følist at vera her og hoyra vanligar føroyingar fortelja mær ting um teirra gerandisdag, sum ikki eru at finna í bókum ella á internetinum, sigur Threes Anna.

Tí vónar hon eisini at fáa orðið øll sløg av fólki í Føroyum, tí ongin søga er ov lítil at koma í notesblokkin sum íblástur til skaldsøguna. Til dømis hevur Threes Anna fingið ein at koma til handils við sær, sum kann greiða henni frá teimum ymsu matvørunum, og hvussu vit brúka tær.

– Annars hopi eg at fáa samband við onkran, sum eg kann sleppa ein túr út í báti við. Eg kundi til dømis gott hugsað mær at vita, hvussu sjómenn halda skil á streyminum. Eg meini, eitt er at skilja eitt streymkort, men hvussu avlesir tú streymin, tá tú ert úti í báti? Hvussu sæst ella følist tað, tá streymurin skiftir?

Threes Anna minnir á, at skaldsøgan verður fiktiv, soleiðis at skilja, at fólk og hendingar ikki verða nevnd men heldur byggja á tað, hon upplivir her í einum blandi av realistiskari og gandakendari søgu.

## Kanska til film

*Bird Island* er fimta skaldsøgan hjá Threes Anna. Hinar fýra eru *The Widow's kiss, Motor Mother, The Silent City og The Bird Can't fly.*

Í 2007 varð *The Bird can't fly* gjørd til film, har Threes Anna sjálv var leikstjóri. Filmurin fekk eina røð av virðislønum og varð vístur á fimsfestivalum og í biografum kring allan heimin.

Í løtuni verður enn ein av hennara bókum gjørd til film, og til upptøkurnar byrja, fyrireikar Threes Anna bókina, har Føroyar eru leiktjald.

Í 14 ár var Threes Anna listarligur leiðari í hálendska Dogtroep teatrinum, sum ferðast kring heimin við sínum sjónleikum.

– Mær hevur altíð dámt væl sjónleik, serliga fyri at síggja, hvussu tú kanst fáa pallmyndina og persónarnar at spæla saman og á ein hátt siga søgur um hvørt annað. Tað verður eisini soleiðis, mín føroyska søga verður skrúvað saman, har bæði oyggjasamfelagið og menniskjuni so at siga eru høvuðspersónar, sigur Threes Anna.

Um skaldsøgan um Føroyar eisini verður gjørd til film, veit hon ikki at siga enn, men myndaliga kann ein leikstjóri illa ynskja sær betri tilfar at arbeiða við, heldur hálendski rithøvundurin og filmsleikstjórin.